Foreldrafundur:

# Politikarar køvdu foreldrakjak

**– Tað, sum skuldi vera ein møguleiki hjá foreldrum at kjakast um skúlan, gjørdist í staðin mest at kalla ein lokalur politiskur valfundur, sigur Jóna Olsen, ið var einasta foreldur, sum hættaði sær at taka orðið á foreldrafundinum, sum Klaksvíkar býráð hevði bjóðað inn til mánakvøldið**

ORÐASKIFTI
*Anna V. Ellingsgaard*
*Myndir: Bárður Lydersen*



*Jóna Olsen var einasta foreldur, ið hættaði sær at taka orðið á felags foreldrafundinum, sum Klaksvíkar býráð hevið bjóðað inn til mánakvøldið*

Tað var lagt upp til tað heilt stóra skúlaorðaskiftið í Skúlanum við Ósánna í Klaksvík mánakvøldið. Í samráð við skúlastýrini, hevði býráðið gjørt av at samskipa árliga felags foreldrafundin við fyrilesturin hjá Georg Metz, »Skolen for livet«, sum ætlandi skuldi geva íbástur til eitt breitt kjak um skúlan í Klaksvík í framtíðini. Eitt frálíkt hugskot, hildu tey flestu, men tíverri køvdu lokalir politikarar bæði Georg Metz og hugin hjá foreldrunum at taka lut í kjakinum.

### Politikarar tóku yvir

Jóna Olsen var einasta foreldur, ið hættaði sær at taka orðið á fundinum. Jóna helt tað eisini vera eitt fínt hugskot at lata fyrilesturin hjá Georg Metz vera íblástur til eitt breitt og mennandi kjak um skúlan og var ti sera spent uppá fundin mánakvøldið.

– Fyrilesturin hjá Georg Metz var ótrúliga áhugaverdur og ein sera góður møguleiki at lyfta hetta afturvendandi kjakið eitt sindur upp um tað gerandsliga og lokala. Fyrilesturin gav okkum foreldrum nakað at hugsa um, og eg ivist ikki í, at vit vóru nógv, sum kendu okkum stimbraði til at taka orðið, sigur Jóna.

So langt komu foreldrini tó ongatíð, tí áðrenn tað, høvdu lokalir politikara yvirtikið kjakið og beint tað á eina leið, har fá kundu vera við longur. Í staðin fyri at kjakast um innihaldið í skúlanum og leiklutin hjá skúlanum í samfelagnum sum heild, kom kjakið at snúgva seg um fíggjarætlanir, hølisviðurskiftið, samanlegging av skúlum og líknandi, sum má metast at vera kommunalir avgreiðsluspurningar heldur enn upplegg til kjak.

– Sjálvandi er tað neyðugt at kjakast um hesi viðurskifti. Eg meini bara ikki, at tey hoyra heima á einum slíkum fundi, har øll foreldur eru boðin við at taka lut í einum aðalorðaskifti. Og eg eri als ikki samd við teimum politikarum, sum søgdu, at tað ikki ber til at kjakast um innihaldið í skúlanum, fyrr enn karmarnir eru í lagi. Vit hava kjakast um karmarnar fyri skúlarnar í Klaksvík seinastu 20 árini, so tað er ikki so løgið, at fólk byrja at ótolnast eftir ein kjaki um, hvat tað er, hesir karmar skulu vera karmar um, sigur Jóna.

### Keðilig byrjan

Tað undrar eisini Jónu, at onkrir lærarar nýttu júst hetta høvið at lufta sínar frustratiónir um vánaligu arbeiðsumstøðurnar í skúlunum í Klaksvík. Ikki tí, hon ivast ikki í, at lærarar eisini hava brúk fyri at kjakast um hesi viðurskifti, men heldur, at eitt eitt slíkt kjak hoyrir heima á einum fundi millum lærarnar og kommununa.

– Vit foreldur hava í øllum førum ikki røttu fyritreytirnar til at fyrihalda okkum til, um ein fysikkstova er nóg væl útgjørd ella ikki. Tí legði hesin parturin av fundinum heldur ikki upp til, at foreldrini blandaðu seg uppí kjakið, sigur Jóna

Jóna heldur tað vera sera spell, at hetta aðalorðaskiftið fekk eina so keðiliga byrjan. Hon vísir á, at tað kann vera sera trupult at savna foreldrini til slíkar stórar fundir, men væntar ikki, at tey hava fingið hug at møta upp næstu ferð, eftir fundin mánakvøldið. Tað er heldur ikki á hvørjum degi, vit fáa høvi at hoyra ein slíkan kapasitet sum Georg Metz, og tí var tað eisini eitt stórt vónbrot, at fyrilesturin ongantíð fekk tann leiklut, hann hevði uppiborið og átti at fingið, heldur hon.

– Sum eg skilji, var Georg Metz bara tann fyrsti í eini røð av fyrilestrahaldarum, sum fyrieikarnir hava fingið at koma til Klaksvíkar í sambandi við hetta aðalorðaskiftið. Eg veit ikki, hvussu tey ætla at skipa fundin næstu ferð, men fyri meg tóktist tað fullkomiliga burturvið, at Georg Metz skuldi sita har og lurta eftir einum lokalum kjaki um bygningar og smálutir, sum hann ongan møguleika hevði fyri at fylgja við í, sigur Jóna



*Í staðin fyri at gerast íblástur til kjak, varð fyrilesturin hjá Georg Metz køvdur av politiskum innleggum, sambært fleiri foreldrum*

### Skipast øðrvísi

Óluva Klettsgarð, formaður fyri skúlastýrið í Skúlanum við Ósánna, skilur misnøgdina hjá foreldrunum eftir fundin mánakvøldið. Hon hendur tó framvegis, at hugskotið við at samskipa fyrilesturin hjá Georg Metz við árliga felags foreldrafundin var gott og hevur avgjørt fatan av, at áhoyrarnir fingu nógv burturúr fyrilestrinum.

– Tíverri gjørdist kjakið ikki tað, vit høvdu ætlað og vónað. Hetta hava vit eisini lært av og arbeiða nú við ymsum hugskotum um, hvussu næsti fundur kann verða skipaður øðrvísi, sigur Óluva Klettsgarð

## Nýggjur leiðari

**Strendur:** Í eina tíð hevur Bygdarhúsið á Strondum verið uttan leiðara. Men nú er nýggjur leiðari settur. Fíggjarnevndin hjá Sjóvar kommunu hevur nevniliga sett Mainhild Harrysdóttir sum leiðara fyri bygdarhúsið á.

Mainhild er longu byrjað í starvinum, tí fyrsti arbeiðsdagur hennara var í farnu viku.

**sb.**

## Fløga um ferðing

**Gøta:** Nú skal ferðavinnan eisini taka ta nýggju tøknina í nýtslu.

Arbeitt hevur verið við útgávu av eini DVD-fløgu, har allir upplýsingar um Føroyar sum ferðamannaland eru í.

Fyri at fíggja hesa útgávuna hava fyrireikararnir m.a. søkt Gøtu bygdaráð um stuðul, og á bygdaráðsfundi mánakvøldið var málið til viðgerðar.

Umsóknin ljóðaði uppá 15.000 kr., men bygdaráðið samtykti ístaðin fyri beinleiðis stuðul, at keypa fyri 2.000 kr. í fløgum.

**sb.**

## 30 pør á hjúnabandslegu

**Havn:** Seinasta vikuskiftið skipaði samkoman Filadelfia fyri skeiði ætlað hjúnum á Hotel Føroyum. Skeiðið varð skjótt fullteknað, tí 30 pør boðaðu frá luttøku.

Undirvísari á skeiðnum var norðmaðurin, Eivind Frøen, sum hevur verið í Føroyum fleiri ferðir, bæði sum prædikumaður, men eisini sum undirvísari.

– Í eini tíð, har fleiri og fleiri hjún velja at skiljast, er eitt slíkt skeið av stórum týdningi fyri at fyribyrgja hesi syrgiligu gongdini, verður sagt.

Á skeiðnum varð nortið við týdningin av samskiftinum millum mann og konu, og um tann ymiska tørvin, ið hesi bæði hava. Nortið varð eisini við, hvussu ymisk tey bæði eru av lyndi, bæði likamliga og sálarliga.

Sagt verður, at Eivind dugdi sera væl at greiða frá, og kom ofta við skemtiligum, men kortini beinraknum søgum um álvarsemið í einum hjúnarlagi.

Skeiðið varð lagt soleiðis til rættis at luttakararnir búðu á hotellinum, og varð hetta mett sum eitt stórt pluss fyri luttakararnar.

**sb.**